**Endurlýsing**

# Sjúkrarøktarstjóri

**Starvið sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum verður við hesum lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.**



Sjúkrarøktarstjórin er partur av sjúkrahúsleiðsluni saman við sjúkrahússtjóranum og lækna-stjóranum.

Næsti fyrisetti er sjúkrahússtjórin.

Ábyrgd og heimildir hjá sjúkrahúsleiðsluni:

- Sjúkrahúsleiðslan hevur í felag yvirskipaðu leiðsluna av Landssjúkrahúsinum. Í hesum liggur: visiónir, mál og menning, sjúklingaviðgerð, diagnostikkur og røkt, gransking, langtíðar fysisk og fíggjarlig planlegging, stovnsmenning og leiðslumenning.
- Sjúkrahúsleiðslan skal virka og uppfatast sum ein heild við sjúkrahússtjóranum sum tann, ið hevur endaligu ábyrgdina yvirfyri Almanna- og heilsumálaráðnum.

Serligt ábyrgdarøki hjá sjúkrarøktarstjóranum:

- Ábyrgd av yvirskipaðu samskipanini á røktarfakliga økinum.
- Veita ráðgeving í røktarfakligum spurningum til Almanna- og heilsumálaráðið.

Førleikakrøv:

- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Sjúkrarøktarfaklig víðariútbúgving frá hægri lærustovni er ein fyrimunur
- Víðariútbúgving og royndir innan leiðslu og fyrisiting
- Kunnleiki og innlit í fíggjarstýring
- Holl vitan um sjúkrarøktina frá fleiri økjum
- Framskygni viðvíkjandi røktarfakligu menningini
- Kunna taka avgerðir saman við hinum báðum í leiðsluni
- Skapandi evni og óbundin av vanahugsan, duga og tora at raðfesta uppgávur
- Góð samstarvsevni
- Góð samskiftisevni
- Góð leiðsluevni

Arbeiðsstað verður Landssjúkrahúsið. Setanarmyndugleiki er Almanna- og heilsumálaráðið. Talan er um fulltíðarstarv.

Nærri fæst at vita um starvið, starvslýsing v.m. við at venda sær til Allan Skaalum, sjúkrahússtjóra, tlf. 304500, lokal 1001 ella Poul Geert Hansen, aðalstjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum tlf. 304050.

Umsókn:
Umsókn við avriti av prógvum, c.v., v.m. skal sendast til

Almanna- og heilsumálaráðið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO – 100 Tórshavn

**Áðrenn 16. mai 2008, kl. 12.00**

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA

Eik

# At vera næmingur í Eik

## Er ferð á tær?



Í Eik vilja vit hava næmingar, ið tora at ganga á odda og eru fúsir at vera partur av eini fyritøku, sum í fullari ferð stevnir móti nýggjum avbjóðingum í Føroyum og uttanlands.

**Vit bjóða**
Í Eik eru nýhugsan og framsøkni høgt í metum og hevur tú áræði, kanst tú vera við til at mynda og ávirka arbeiðsdagin á tínari deild.

Sum næmingur í Eik ert tú partur av einum væl samanspældum toymi av ágrýtnum og professionellum fólki, sum á hvør sín hátt eru við til at gera Eik til eitt avbjóðandi og spennandi arbeiðspláss.

Í ár seta vit næmingar á deildum okkara í Kollafirði, Havn, á Sandi, Saltangará, Norðskála, í Gøtu og Sørvági.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Margrethu Rustin Heinesen, tlf. 348514, teldupost: margretha.heinesen@eik.fo

Les meira um næmingatíðina og útbúgvingina á heimasíðum okkara www.eik.fo og www.18-25.fo

Umsókn við avriti av próvskjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. mai 2008, kl.12.00.

**Umsóknin skal sendast til:**
Eik
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

**Eisini ber til at søkja umvegis heimasíðuna**
www.eik.fo